# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 18.04.2016 kl. 17.30 |
| Á fundi: | Trúgvi Gudmundarson<br>Rúni Thomsen<br>Eyðfinn Debes<br>Martin í Nesi<br>Niels J. Thomsen<br>Jóhan Eli Poulsen |
| Ikki møtt: | Magni Bertholdsen |
| Skrivari: | Johanna B. Djurhuus |

Formaðurin bað um loyvi at taka fýra mál við aftrat – koma á skrá sum mál nr. 4, 5, 9 og 10 – tey síðstu fyri afturlatnum hurðum.

1. **Skriv viðv. kloakkviðurskiftum.**
   Gjørt verður vart við, at í sambandi við felags kloakk í túninum á Bíarvegi 105, er kloakkin brotin í fleiri støðum. Samtykt varð, at formaðurin hjá kommununi kannar viðurskiftini á staðnum.

2. **Skriv viðv. stigum á havnalagnum á Hamranesi.**
   Heitt verður á Hvalbiar Kommunu um at seta stigar uppvið á norðaru síðu á Hamranesi, har sum kranin er. Samtykt varð, at Vega- og havnanevndin kannar málið til komandi fund.

3. **Umsókn um byggiloyvi til garð omanfyri húsini á matr. nr. 170m, Hvalba.**
   Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi til garð sambært givnum upplýsingum og tekning.

4. **Fótbóltsvøllurin – skriv frá Eyðfinn Debes.**
   Eyðfinn vísir á, at um fótbóltsvøllurin framyvir skal lúka krøvini frá FSF, má ein dagføring til. Samtykt varð at kanna møguleikan at leiga eina trumlu við píkum at koyra eftir vøllinum og annars at fáa eina fasta mannagongd um viðlíkahald av vøllinum framyvir.

5. **Umsókn um stuðul til 3 ferðandi av Hamragarði í Vági.**
   Samtykt varð at stuðla við kr. 1.500,- íalt.

**6. Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**

**7. Byggiloyvi til dagstovn á matr. nr. 145a, Hvalba.**
Vørn/Brunaeftirlitið og Sløkkiliðið á Tvøroyri hava havt tekningarnar til dagstovnin til viðmerkingar. Ætlanin viðvíkjandi rýmingarleiðum v.m. er góðkend av teimum og ongar viðmerkingar eru. Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi til dagstovn sambært umsókn, tekningum, givnum upplýsingum v.m.

**Ikki almenn mál**:

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 20.30

| | | |
|---|---|---|
| Trúgvi Gudmundarson | Rúni Thomsen | Eyðfinn Debes |
| Martin í Nesi | Niels Jacob Thomsen | Jóhan Eli Poulsen |